# Guðrun skrivar sangir sjálv



*Guðrun er væl nøgd við søluna av fløguni hjá sær í Danmark. Um vikuskiftið fer hon at syngja í Føroyum saman við Jacob Andersen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nú er føroyska poppstjørnan í Danmark farin at skriva sínar egnu sangir. Guðrun Sólja Jacobsen ætlar, at onkur av hesum sangum skal við næstu útgávuni hjá henni, sum hon ætlar at brúka neyðugu tíðina til at gera**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Stjørnan yvir allar hinar í eitt kvøld er í hesum á døgum á konsertferð í Føroyum.

Hon hevur danan Jacob Andersen við sær í fylginum til Føroya, og tey syngja í Trongisvági, Fuglafirði og Klaksvík um vikuskiftið.

Og hóast hon nú hevur fingið fótin inn um í donsku tónleikavinnuni, so er tað framvegis nakað serligt at koma til Føroya at syngja.

- Eg føli tað, sum má eg geva mítt allarbesta í Føroyum. Ja, tað skal í grundini nakað eyka til, tí eg eri ikki líkaglað við, hvat føroyingar halda um meg, sigur Guðrun.

- Uttanlands er tað á ein hátt lættari, tí har kann eg bara lata sum einki, um fólk ikki dámar tónleikin hjá mær. Í Føroyum vil eg bara vísa tað besta, sigur hon.

## Stór søla

Síðani Guðrun vann sangkappingina Stjørna í eitt kvøld, hevur hon havt úr at gera. Hon skuldi í upptøkutólini at gera fløgu, sum kom út í summar, og umframt tað hevur verið nógv úti og sungið fyri fólk til alskyns tiltøk.

Fløgan hjá Guðrun hevur selt væl, og hon hevur ligið ovarliga á sølulistanum í Danmark.

- Vit nærkast platin nú, og eg havi ein lítlan dreym um, at tað liggur ein platinpláta undir jólatrænum, sigur hon.

Danska tónleikavinnan letur gull og platinplátur til tey, sum selja væl. At Guðrun nærkast platin merkir, at hon hevur selt næstan 40.000 eintøk av fløguni hjá sær.

- Eg eri sera væl nøgd við søluna, og tað er plátufelagið eisini, so eg fari helst at geva eina fløgu afturat út hjá Universal, men tað er ikki avgjørt, nær tað verður, sigur Guðrun.

## Skrivar sjálv

Guðrun er nú farin at skriva tónleik sjálv.

- Eg havi ikki skrivað nakran tónleik áður, men nú siti eg uppi um náttina og skrivi sangir. Eg vóni, at eg kann brúka onkran av hesum á næstu fløguni hjá mær, sigur hon.

Hon ætlar at brúka neyðugu tíðina til at gera næstu fløguna, tí hon helt, at upptøkuarbeiðið til fyrstu fløguna gekk í so skjótt. Men soleiðis vóru treytirnar, fløgan skuldi út sum skjótast.

Um vikuskiftið verður Guðrun so at hoyra á føroyskum palli saman við Jacob Andersen, sum var nummar tvey í kappingini við Guðrun.



# Hibernian er áhugað í Jann Inga

**Jann Ingi Petersen hevur júst royndarvant við skotska Premier League felagnum, Hibernian. Skotska felagið er framvegis áhugað í føroyska miðvallaranum, og hann skal møguliga royndarvenja við felagnum aftur**

ROYNDARVENJING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá Fremad Amager veit at siga, at føroyski landsliðsleikarin, Jann Ingi Petersen, hevur júst verið og royndarvant við skotska felagnum Hibernian. Eftir kappingarárið í Føroyum var av, byrjaði Jann Ingi Petersen alt fyri eitt í Fremad Amager.

Fyrrverandi B68-leikarin hevur higartil leikt fýra dystir við Fremad Amager. Danska 1.deild er farin í vetrarfríð, og tí lá væl fyri hjá Jann Inga at royna seg í Hibernian. Hann hevur bæði vant við fyrsta liðs hópinum og U-21 liðnum hjá við skotska Premier League felagnum, og sambært heimasíðuni hjá Fremad Amager hevur tað gingið væl.

Hibernian er framvegis áhugað í Jann Inga, og góður møguleiki er fyri, at hann aftur skal royndarvenja við felagnum.

Jann Ingi Petersen hevur sáttmála við Fremad Amager til 31.12.06



*Skotska felagið, Hibernian, er áhugað í unga toftamanninum Jann Inga Petersen*

## Jólasølan hjá Verkstaðnum Vón

Árliga jólasølan verður á Verkstaðnum mikudagin 26. november frá kl. 14.00-20.00 og hósdagin 27. november frá kl. 14.00-19.00.

Møguleiki verður at keypa sær drekkamun við onkrum heimabakaðum afturvið.

**Øll eru vælkomin.**

**Verkstaðið Vón**
Hóvabrekka 1 · Argir

## Reingerðingsvognar -til øll endamál

Multi-PressFlatmop-system ið tryggar effektivitet

Einfalt og lætt við Broad Press System

Gloym pressuna - skift til moppuna Wash & Dry

Wetmop -vanlig, einføld og økonomisk wetmopsystem

Vaska smærri økir við Mini Mop

A.H.Jensen
Stoffalág 25, tlf.: 322 676, fax: 318 101
E-mail: a_jensen@post.olivant.fo




Oljumálaráðið fer á oljuráðstevnuni at greiða frá aðru loyvisrundu. Hóast freistin at lata inn nominatión av teimum økjum, sum oljufeløgini ynskja við í eitt komandi loyvisumfar ikki er úti fyrr enn 15. desember, hevur Oljumálaráðið væntandi eina hóming av, hvussu áhugin fyri aðru loyvisrundu er millum oljufeløg. Og sum vanligt er, fara oljufeløgini og vinnan at gera status.

Hugt verður meira alment at okkara øki, hvussu virksemið broytist. Avbjóðingin bæði at síggja og bora gjøgnum basalt verður eisini viðgjørd á oljuráðstevnuni. Allar framløgurnar verða á enskum.

Tú kanst melda til á www.industry.fo, við teldupostí til industry@industry.fo ella við at ringja til Vinnuhúsið tlf. 31 18 64. Síðsta freist at tekna seg er fríggjadagin 28. november.

Luttøkugjaldið er 1.000 krónur, men ert tú limur í Oljuvinnufelagnum er gjaldið 750 krónur. Íroknað luttøkugjaldið er kaffi, morgunmatur og leskidrykkir. Verður meldað til oljuráðstevnuna seinni enn 28. november, hækkar luttøkugjaldið við 500 krónum.

8.30–9.00 **Registration and coffee**

**OPENING ADDRESS**

9.00–9.15 **Opening address**
EYÐUN ELTTØR,
*Minister of Petroleum*

**SECOND LICENSING ROUND**

9.15–9.30 **Second licensing round**
HERÁLVUR JOENSEN,
*Permanent Secretary of the Ministry of Petroleum*

**THE ATLANTIC MARGIN IN CONTEXT OF NORTH WEST EUROPE DEVELOPMENT**

9.30–9.55 **The future of the north Sea and BP's role in it**
CRAIG MCKENZIE,
*North Sea Projects PUL, BP*

9.55–10.20 **Atlantic Petroleum, a new player in North West Europe**
WILHELM PETERSEN,
*General Manager, Atlantic Petroleum*

10.20–11.00 **Coffee**

11.00–11.45 **Atlantic Frontier ... a 10-year perspective**
JEREMY CRESSWELL,
*Editor, The Press and Journal Energy Monthly*

11.45–13.00 **Lunch**
*During lunch the prize will be handed to the winner of the Petroleum Exploration Business Game Xplore*

**THE CHALLENGE OF THE BASALT**

13.00–13.15 **Future exploration issues of the Faroe Islands**
SIGURÐ Í JÁKUPSSTOVU,
*Director, Faroese Geological Survey*

13.15–13.40 **The basalt challenge – seeing through it, drilling through it**
GARETH ALLINSON,
*Exploration Manager Western Europe, Statoil*

13.40–14.00 **Coffee**

**STATUS**

14.00–14.45 **Still early days**
MAGNI ARGE,
*Faroe Oil Industries' Association*

**Status of exploration of the Faroese Area**
BEN ARABO,
*Faroe Oil Industry Group*

14.45–15.00 **Magni Arge, Chairman of FOIA, concludes the day**
**Refreshment**

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*

Oljuvinnufelagið, c/o Vinnuhúsið,
Boks 1038, R.C. Effersøesgøta 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 18 64 · Fax 31 72 78
industry@industry.fo · www.industry.fo

The Faroes Partnership

REPROZ